# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Lánsveitslan av

Í seinastu frágreiðingini hjá Landsbankanum verður víst á, at altjóða fíggjarkreppan og búskaparútlitini gera, at óvissa er, tá metast skal um føroysku búskaparútlitini, og at tað er ivasamt, um tað almenna framhaldandi kann virka sum lokomotivið, ið skal stimbra búskapin. Víðari verður víst á óvissuna á fíggjarmarknaðinum, misjavna rávørutilgongd í tilfeingisvinnuni, fløskuhálsar á arbeiðsmarknaðinum og ivan um framtíðar leiklutin hjá landinum við atliti til stimbran av búskapinum. Gjørt verður vart við, at innlendskur eftirspurningur hevur verið meginorsøkin til vøksturin seinastu árini, og at hesin vøkstur í stóran mun hevur verið fíggjaður við skattalætta og frívirðunum. Her liggur sostatt ikki ein útflutningur grundaðaður á framleiðsluvinnuna aftan fyri tað sera nógva búskaparliga virksemið, sum hevur eyðkent Føroyar seinastu árini. Hetta merkir, at tað serstakliga eru tænastu- og byggivinnurnar, ið hava havt tann stóra vøksturin. Landsbankin vísir á, at enn eru bankarnir bundnir av givnum tilsøgnum, og tí verður talan ikki um nakran veruligan steðg í búskaparvøkstrinum her og nú. Men roknast kann við, at bankarnir í framtíðini verða varnari í lángeving sínari, sigur Landsbankin í frágreiðing sínari. Landsbankin leggur eisini dent á, at størsta ávirkanin á uppgongdina seinastu 2 árini hevur verið størri nýtsla og íløgur hjá húsarhaldunum. Afturat hesum kemur misjøvn rávørutilgongd í tilfeingisvinnuni, tó at framleiðsluvøkstur hevur verið í alivinnuni og stórt trýst á arbeiðsmarknaðin.

Hóast Landsbankin metir, at talan verður um búskaparvøkstur uppá 4,7% í 2008, kann uttan víðari staðfestast, at her er talan um ávaringarljós, ið eru farin at blunka. Landsbankin nevnir millum annað fíggjarkreppuna og búskaparútlitini úti í heimi, sum elva til óvissu. So er spurningurin, hvat landsstýrið og samgongan gera við hesa frágreiðing. Hóast víst verður á glottarnar, so má henda frágreiðing fáa fíggjarmálaráðharran at rakna við. Alt bendir á minni lánsfíggjað virksemi, samstundis sum sjálvur fíggjarkostnaðurin verður hægri. Tað almenna kann, sum umstøðunar eru neyvan loyva sær at økja um nýtsluna. Sitandi fíggjarmálaráðharri hevði, tá hann sat við starvinum undir fullveldislandsstýrinum bert eina resept nevniligi avlop á fíggjarløgtingslógini, og tað var væl skiljandi, tí hann skuldi fíggja avloysingina av blokkinum. Hann hevur meira ella minni beinleiðis signalerað, at honum framvegis best dámar hesa uppskrift. Verður sæð burtur frá hesum veiku signalum, eru eingi tekin til, at landsstýrið hevur nakra strategi at takla eina hóttandi búskaparkreppu. Við blokkniðurskurði og minkandi fiskastovnum er hetta heldur eingin lættur setningur og komandi mánaðirnir fara at vísa, um samgongan hevur megina til at takla ta støðu, sum landsbankin nú lýsir. Tað kann fara at gerast neyðugt við illa dámdum tiltøkum, sum bert ein sterk samgonga megnar at fremja.

**Sosialurin**

## Føroyingar góðska ullina til pløgg

**ÁRNI T. BRATTABERG**



Bretar bjálva við seyðaull.
Føroyingar brenna ullina.
Skúlaflokkur vinnur kapping, nýt ullina til bjálving.
Búnaðarstovan skipar fyri fundi um framtíðar seyðahald.

Hetta er nakað av tíðindaflutninginum í fjølmiðlunum.

Men, hvat er veruleikin um ullina, sæð við SIRRI eygum?

Mett verður, at nøgdin av ull, sum kundi komið til høldar í Føroyum liggur um 75 tons.

Sirri byrjaði at taka ímóti ull í 1998, sostatt hava vit tikið ímóti ull í10 ár, ein samanløgd nøgd uml. 250 tons.

Í 2002 kom ein innheintingarskipan í gildi, har tey sum lata ull fáa 4 kr/kg sum stuðul frá eini játtan til landbúnað.

Sambart innheintingarskipanini eru hesar nøgdir komnar til góðkendar móttøkur.

**Seinasti 5 árini:**
2003 59 tons
2004 42 tons
2005 22 tons
2006 38 tons
2007 44 tons

Øll ull, sum Sirri hevur keypt, er komin til høldar. Árini fram til 2006 tóku vit ímóti meira, enn vit vóru før fyri at framleiða vøru úr. T. d. 2007 hevði verði ein fyrimunur at fingið 10 tons meira.

**Aftur til yvirskriftirnar**

Nýta ullina til bjálving: Ull, sum er so vánalig, at hon ikki kann nýtast til at gera teppitógv úr, verður, sum ein møguleiki, nýtt til bjálving. Prísur, latin til virkið 1,50 kr/kg. Fyri ull til teppitógv fæst 2 kr/kg.

Føroyingar brenna ullina. Ja, tað er ein hálvur sannleiki, tí umleið helvtin kemur ikki til høldar.

Hvør er orsøkin? Er prísurin ov vánaligur? Er ongin móttøkuskipan? Ella, er tað vanlig marglætisvælferð?

**Hvussu er prísurin á ull?**

Sirri letur 8kr/kg í býti við sirrivøru ella 4kr/kg kontantgjald.

Stuðul 4kr/kg umsitið av Royndarstøðini.

Hvat kostar tann føroyska ullin, tá ið hon er klár at nýta í framleiðsluni?

Keypt ull 8kr/kg
Innheinting, flokking, pakking, fluttningur og vask. 12kr/kg
Rennement 62 % ella 30kr/kg, klár at fara í karðan.

Um so var, at tú vildi keypt íslendska ella norska ull í sama góðskuflokki á marknaðinum í Bradford, fæst hon fyri hesar prísir: Hvít 16kr/kg, myrkamorreyð og ljósamorreyð 13kr/kg
ljóstgrá 11kr/kg og myrktgrá 9kr/kg.

Orsøkin til, at Sirri kann lata vøru ella pening fyri ullina er bert, tí vit hava megnað at fingið ein marknað í Føroyum og uttanlanda fyri Sirrivøruna.

Gudrun og Gudrun er nógv frammi í fjølmiðlunum, ein partur av teirra rávøru er Sirritógv.

Somuleiðis í samband við ferðavinnu, hevur rein føroysk ull í natúrlitum marknaðarvirði.

**Er ongin móttøkuskipan?**

Sirri hevur, saman við Postverki Føroya, gjørt eina skipan, sum røkkur í hvønn krók í landinum.

Ullalatarin keypur ein posa frá postverkinum, framleiddur hjá Vestpack til endamálið, posin kostar 5 kr. Í hvønn posa fara uml. 12kg ull. Sirri rindar fyri flutningin.

Tað, sum vit hoyra er, at tey, sum senda, eru fegin um skipanina

*Vit meta, at vit eru komin so mikið ávegis at virka úr føroyskari ull,* at tað kann áleggjast øllum, sum eiga ull, at hava skyldu at lata ullina í ta skipan, sum í dag er fingin at virka.

Alt annað er undanførsla.

Um so er, at ullaeigarin metir, at hann fær ov lítið fyri ullina, hevði verði áhugavert at fingið at vita, hvussu hann vil broyta tað.

Skinnini eru í samband við brennistøðina nokk ein størri trupulleiki.

Har er eisini ein spurningur um at góðska skinnini og at finna ein marknað. Tað er einasti vegur.

Hettar er rættiliga kostnaðarmikið. So er tað, hvør vil taka møguleikan.

Vit gjørdu eina lítla roynd í fjør, við gott 4000 skinnum, sum sær út at eydnast.

## Føroysklærugreinin og føroyska málið nú og í framtíðini

*Tíðindaskriv frá Móðurmálsfelagnum*

Móðurmálsfelagið skipar fyri limafundi og aðalfundi 12. apríl á Landsmiðstøðini kl. 14.00. John Dalsgarð, sum var skrivari í málstevnunevndini, fer at hava framløgu av arbeiðnum hjá málstevnunevndini. Hetta verður fyrsta almenna framløgan av arbeiði málstevnunevndarinnar, og tað er stak viðkomandi, at tað júst verður í móðurmálslærarafelagnum, at henda framløga verður. Eingin bólkur í føroyska samfelagnum hevur so stóra ávirkan á málstøðuna hjá føroyska almenninginum sum føroysklærararnir.

Føroyska skúlaverkið fyllir nógv í álitinum hjá Málstevnunevndini, og John Dalsgarð fer í síni framløgu at leggja serligan dent á støðuna hjá føroyskum máli í skúlaverkinum og samstundis leggja upp til kjak um, hvørji framtíðarútlitini hjá føroyska málinum eru í skúlaskipan okkara og samfelagnum sum heild.

Í móðurmálslærarafelagnum vóna vit, at henda framløga og hetta kjak fer at vera við til at seta sín dám á, hvussu føroysklærugreinin fer at síggja út í framtíðini. Nýggir miðlar, fjølsamansettur upplýsingarfloymur og stórur opinleiki eru við til at seta sín dám á gerandisdagin hjá flestum næmingum í føroyska skúlaverkinum, og tí er viðkomandi at seta føroyska málið og føroysklærugreinina á dagsskrá.

Nýggir limir kunnu tekna seg á fundinum og til framløguna av Málmørkum eru onnur enn lærarar eisini vælkomin.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.